# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ágangur móti Landssjúkrahúsinum

Bæði umboð fyri andstøðu og fíggjarmálaráðharri eru í øðini, nú tað er komið undan kavi, at serstakliga Landssjúkrahúsið (LS) hevur brúkt meiri av peningi enn játtað er á fíggjarlógini fyri 2008. Enn er eingin fíggjarlóg fyri 2008, og stovnarnir skulu tí halda seg til at gjalda tað, ið er neyðugt fyri raksturin. Karsten Hansen sigur, at syndararnir skulu finnast, og tað skal fáa fylgjur, um játtaninar ikki verða hildnar. Tað skal strammast upp serstakliga á LS, so vit fáa mest fyri hvørja krónu. Yvirforbrúkið skal steðgast. Landsstýrið fer at tryggja sær tað fulla fíggjarliga yvirlitið. Næstforkvinnan í Landsstýrismálanevndini ætlar at taka málið við meirforbrúkinum á LS upp har. Hetta mál er landsstýrismálanevndini óviðkomandi – tað hoyrir heima hjá Løgtingsgrannskoðarunum, um hetta yvirhøvur er búgvið at koma á tingborð. Tann klassiska jagstranin eftir syndabukkum er byrjað, og hetta er viðkomandi politikkarum til lítlan sóma. So nógv bendir sostatt á, at stóri syndarin enn einaferð eitur LS.

Spurningurin er, um hetta er fair. Er tað ikki heldur so, at stovninum ikki verður játtað tað, ið honum tørvar til tess at geva okkum tær bestu tænastur? Tað eru politikararnir, ið eru veruligu syndararnir. Teir venda rætt og slætt blinda eygað til veruleikan. Og hann er, at eingin torir taka uppá tungu, at vit hava trý sjúkrahús til 48.000 íbúgvar, og tá hesi skulu útbyggjast sohvørt og ein dýrur rakstur skal fíggjast, so setir tað ov stór krøv til okkara fíggjarligu orku. Tað ger, at peningurin, ið annars kundi farið til at røkt og ment eitt høvuðssjúkrahús verður býttur millum trý sjúkrahús. Hvat samfelag við minni enn 50.000 íbúgvum og sum entá vil standa á egnum beinum við avmarkaðum tilfeingi kann loyva sær at halda fram við at reka og byggja út trý sjúkrahús – samtíðis sum sama samfelag ger milliarda íløgur í vegir, tunnlar og skip fyri nettupp at gera tað skjótari og lættari at koma til viðgerðarstovnar so sum LS? Her hongur sum vant ikki saman hjá politikkarunum.

Tað áliggur okkara politikarum ein ábyrgd at húsast við teimum pengum, sum eru til taks. Tvs. ikki at lata avmarkaða peningatilfeingið fara til dupultfunktiónir og harvið forða fyri, at nakað virkar optimalt. Kjakið um LS er eitt talandi dømi um ábyrgdarloysi hjá okkara politisku skipan. Eingin torir at nerta við spurningin, hvussu vit skilabest menna og reka okkara framtíðar sjúkrahúsverk við einum vælvirkandi høvuðssjúkrahúsi. Ístaðin fyri at seta hol á kjakið, hvussu vit fáa eitt vælvirkandi LS og hvussu vit so brúka og menna hini sjúkrahúsini til tað framtíðin loyvir, eitt nú geva teimum funktiónir, ið ikki krevja kostnaðarmikla sjúkrahúsviðgerð og rakstur, so brúka politikarnir orkuna til at jarða LS, tí tað í veruleikanum hevur eina ómøguliga uppgávu – at skula virka sum meginsjúkrahús uttan neyðturviligu játtaninar.

**Sosialurin**

# Muhamedstekningar



**KAI VÁGFJALL**

kv@post.olivant.fo

Fyri nøkrum mánaðum síðani vóru nakrar tekningar avdúkaðar í danska blaðnum Jyllandsposten, sum skuldi vera av Muhamed profeti. Onnur donsk bløð almannakunngjørdu eisini hesa tekning og aðrar við, sum vóru gudsspottandi, mótvegis muhamedstrúnni, ella islam, sum sagt verður ídag.

Tekningarnar fóru víða um heimin, har tær vóru endurgivnar í kendum tíðarritum og bløðum. Hetta østi tann islamiska heimin, sum vera mann, og varð handilsboykott lýst av donskum vørum í hesum londum. Danabrók varð brend alment og dukkur, sum ímyndaðu danska forsætisráharran, vóru brendar ella hongdar í gøtunum kring um í islamiska heiminum. Eldur varð eisini settur á onkra danska sendistovu.

Mangur hevur sett spurningin, hví og hvat var endamálið við slíkum tekningum ella provokatión? Tá svarað hevur verið, verður víst til tali- og skrivifrælsi, um verju av demokratinum o.s.fr.

**Var tað nú vegna tælifrælsi??**

Fyri nøkrum árum síðani fór land okkara ígjøgnum eina djúpa fíggjarliga kreppu. Útlendsk bløð, serliga tey donsku, vóru á tremur við frásøgnum higani. Tey vistu øll so sera væl, hvat orsøkin var. Føroyingar høvdu livað yvir evnir! Teir høvdu bygt tunnlar og brýr í hópatali o.s.fr. Eingin endi var á teirra ástøði og boð uppá, hvat orsøkin til okkara kreppu varð. Har var eisini kappast um at greiða teirra lesarum frá, hvussu ábyrgdarleys vit høvdu verið. Tey fírdu ikki fyri, at borðreiða við beinleiðis lygnum um okkum, og tað kreppu vit vóru komin í – stóru og feitu yvirskriftirnar skuldu jú selja, so vertin á hvat var sannleiki og hvat var lygn.

Sjálvandi gjørdist hetta ovboðið fyri mong her á landi. Fleiri trivu í pennin, og sendu viðmerkingar og rættleiðingar til donsku bløðini. Flestu av hesum viðmerkingum og rættleiðingum komu ongantíð á prent. Tá hevði tali- og skrivifrælsið ongan týdning.

**Danir vita og duga best!**

Fyri stuttum vóru nakrir menn handtiknir í Danmark, skuldsettir fyri at hava ætlanir um, at drepa ein av hesum donsku muhamedsteknarunum. Sum hevnd fyri slíka ætlan, valdu donsku bløðini at endurprenta nevndu muhamedstekningarnar. Úrslitið varð enn einaferð øsing, ófriður og boykott av donskum vørum í islamiska heiminum.

Eisini her á landi valdi Dimmalætting at endurprenta hesa tekning. Hvat endamálið hjá Dimmu var, er torført at fáa eyga á. Men tað vísir seg so, at tað sum danir gera, skulu vit sjálvandi apa okkum eftir. Danska sjónvarpið sendir 90-ára føðingardagin á hvørjum nýggjáraftan. Tað mugu teir um. Hvat ger so SvF, jú, teir gera tað sama, tí danir gera so. Danir endurprenta muhamedstekningar, so mugu vit gera tað sama o.s.fr.

**Skulu øll verða sum danir?**

Danir skuldu læra islamiska heimin um demokrati, tali- og skrivifrælsi. Teir skulu læra teinkja og vera sum danir, annars eru teir tápulingar. Vit føroyingar skulu eisini læra at verða sum danir og teinkja og hátta okkum sum teir, annars eru vit býttir. Danir vita best!!! Teir lærdu okkum jú um ”sandhedens time” á sinni.

Sjálvt her á landi eru fólk, sum hava hava fingið skil á, at danir vita og duga best. Tey halda, at føroyingar duga einki!! Vita einki!! Kunnu einki!! Tí skulu vit m.a. einki føroyskt Fíggjareftirlit hava. Annars missa vit okkara trúvirið!!! Sig so tað!! Hví skulu vit yvir høvur teinkja sjálvi???? Danir duga jú best. Lat teir teinkja fyri okkum!!!

Eg spyrji, hvar er okkara sjálvsvirði og okkara sjálvsálit?? Nær fara vit at hugsa sjálvi??

**Orðabókakollvelting**

# Føroyskt-enskt og enskt-føroyskt



**EYÐUN Á BORG**

kv@post.olivant.fo

Teir báðir, Anfinnur og Jonhard, hava framt eitt megnaravrik við hesum báðum orðabókunum, ja, eina málsliga kollvelting. Sum brúkari og sum føroyingur sigi eg til lukku og takk!

Takki eisini fyri eina stórfingna løtu í lærarаskúlahøllini, tá orðabøkurnar vórðu lagdar fram alment.

Sama kvøld var annars kjak í sjónvarpinum um enska ávirkan á føroyskt. Løgið, at teir slíka løtu ikki heldur fegnaðust meir um , at tað nú er lættari at sleppa inn í alheimsmálið enskt. Og, ikki minst tað, sum ikki varð tikið upp á tungu í sjónvarpinum, at vit nú sleppa beinleiðis millum føroyskt og enskt, uttan at skula noyðast gjøgnum danskt. Tað er ovurstórt framstig, tað er málslig kollvelting!

**E.S.** Ikki: eini góð páskir, men: Eg ynski øllum einar góðar páskir!

**Við málkvøðu**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.